# Hvørt við sínar náðir...

HØGNI
HOYDAL



**Vit vilja traðka út í heim, grundað á okkara rætt til frælsi, fólkaræði og javnrættindi. Men tað krevur, at vit eisini byggja okkara egna samfelag á fólkaræði, frælsi og javnrættindi hjá øllum persónum og bólkum. Tað er treytin fyri einum nútímans og skapandi samfelag.**

*Samdist alt við foldina,*
*hvørt við sínar náðir...*
(Fuglakvæðið)

Verið errin og opin. Gangið fatt. Øll tit, sum eru samkynd og øll sum stuðla rættindum hjá samkyndum og øðrum minnilutabólkum, ið ikki hava javnrættindi í samfelagnum.

Tykkara tol, og tað tit hava tolt. Okkara dreymar og vónir um broyting. Tað er alt spunnið tógv. Spunnið tógv, ið kann bindast til eygu í tí stóra og marglitta klæði, ið eigur at knýta fólk saman kring allan heim. Eitt klæði, ið er bundið við ymiskum stokkum. Úr ymsum tógvi, ið er spunnið á ymsum snældum og úr ymsum tilfari. Eitt klæði, ið er bundið av summum, ið binda rætt og summum, ið binda rangt. Men har tað, ið sumstaðni verður kallað at binda rætt, aðrastaðni verður rópt at binda rangt. Men alt mannatilfar kann nýtast, tí tað snýr seg um mannavirði. Tað snýr seg um, at hvør hevur rættin at liva og virka og elska. Hvørt við sínar náðir.

**Frælsi, fólkaræði og javnrættindi**

Málið um eina lítla broyting í revsilógini hevur tíverri snúð seg um so nógv annað. Men tað snýr seg burturav um frælsi, fólkaræði og javnrættindi.

Og øll tit, sum hava stigið fram á torg. Samkynd. Foreldur. Uppskotsstillarar. Stuðlar og stuðulsfyriskiparar. Tit hava givið einum fyrr duldum spurningi, ítøkilig andlit, sál og hjarta. Tit hava fingið okkum at síggja okkum sjálv við eygunum hjá tí, sum er øðrvísi og at viðgera grundleggjandi frælsis- og rættindaspurningar.

Tað er er bæði ein spurningur um eitt føroyskt fólkaræði, frælsi í Føroyum og lógartryggjað rættindi hjá minnilutabólkum í Føroyum, sum vit ongantíð hava tikið greiða støðu til, men hava latið syftast í ongamannalandi. Men málið snýr seg samstundis um algildar og alheims spurningar. Tá ið vit taka støðu til frælsi, javnrættindi og rættarverju hjá minnilutabólkum, taka vit eisini støðu til frælsi, javnrættindi og rættarverju hjá okkum øllum.

Tí hvussu kunnu vit vera fræls, um vit ikki samstundis treyta okkum at næstin er frælsur? Hvussu skulu onnur virða frælsið hjá okkum, um vit ikki virða teirra?

Hvussu kunnu vit krevja at hava og menna ein samleika, um vit ikki góðtaka og tryggja, at onnur kunnu hava og menna sín samleika?

Hvussu kunnu vit tosa um eitt fólkaræði, um vit ikki lógartryggja og lógarverja rættindini hjá øllum fólki, ið ikki gera seg inn á onnur?

Og hvussu kunnu vit tosa um eitt fjølbroytt og livandi samfelag, um vit vilja koyra tað, sum er øðrvísi inn í skáp og burtur av samfelagspallinum?

**Fólkaræði er at vera ósamd og ólík**

Onkur vil vera við, at fólkaræði snýr seg um at meirilutin ræður, og at tað, sum er mest og líkt, hevur framíhjárætt. Eftir mínum tykki er tað júst øvut.

Fólkaræði snýr seg um at vera ósamd og ólík. Fólkaræði snýr seg um at lógartryggja rættindini hjá øllum persónum og hjá øllum minnilutum uttan mun til eyðkenni ella frábregði – so leingi tey ikki gera seg inn á rættindini hjá øðrum. Og um vit ikki berjast fyri tí – hóast vit kunnu vera so ósamd sum nakrantíð við okkara næsta og við minnilutabólkar – so er okkara egna frælsi eisini tómt. Tá kunnu aðrir meirilutar taka okkara frælsi burtur við givið høvi.

Frælsisstríð og stríð um javnrættindi eru í veruleikanum drívmegin í allari heimssøguni. Tað, sum hevur flutt mørk í heiminum, eru ikki pengar og vápn og tøkni. Men stríð fyri frælsi og javnrættindum. Um tað eru tjóðir, stættir, aðrir samfelagsbólkar, kvinnur, fólk við ávísum húðaliti og uppruna, politiskari sannføring ella trúarbólkar. Tey hava stríðst móti teirri fatan og móti teimum samfelagsskipanum, sum hava hildið uppá, at frælsi hjá einum bólki er treytað av, at onnur ikki hava frælsi og javnrættindi. Og øll døpur mein í heimssøguni eru høgd við, at tey, ið sita við valdinum ikki vilja geva framíhjáræettindi frá sær til tey, ið krevja javnrættindi. Men tá stríð um javnrætt eru vunnin, hevur tað gjørt øll frælsari. Tá er tað margfalda og fjølbroytta skapt.

Hóast vit í Føroyum tíbetur hava havt minni ógvislig stríð um frælsi og javnrættindi enn vit kenna aðrastaðni í heiminum, so er stríðið tað sama. Stættir, kvinnur, fólk við øðrvísi húðaliti og uppruna, øðrvísi politiskari sannføring og ikki minst trúarbólkar hava upp gjøgnum seinastu øld og enn í dag mugað stríðst fyri javnrættindum og minnilutaverju.

**Ger seg ikki inn á frælsið hjá øðrum**

Sjálvandi skulu tey tryggjast javnvirði og javnrætt. Eins og fólk við ymiskum kynsligum samleika. Tað merkir ikki, at bólkar hava fingið serrættindi ella serlóggávu ella hava gjørt seg inn á rættindini hjá øðrum. Tað merkir heldur ikki, at øll forfylging og vantandi javnstøða er burtur. Tað merkir bara, at øll eru líka fyri lógini og at øll hava krav uppá somu lógarverju í einum fólkaræðisligum rættarsamfelag.

Broytingin í revsilógini snýr seg um at øll skulu verjast ímóti at fólk tilvitað eggja til hóttan, háðan ella niðurgering í almenna rúminum mótvegis bólkum, ið hava eginleikar, ið vit øll eru fødd við. Uppruna, húðarlit, tjóðskap, trúgv og eitt kynsligt tilhall. Lógin verjir øll, tí hon nevnir bert grundleggjandi menniskjalig eyðkenni, ið øll hava, men sum sjálvsagt eru ymisk. Hon verjir bæði meirilutar og minnilutar. Lógin ger seg heldur ikki inn á rættindi hjá nøkrum øðrum.

Vit vilja traðka út í heim, grundað á okkara rætt til frælsi, fólkaræði og javnrættindi. Og vit eiga at stríðast fyri frælsi, fólkaræði og javnrættindum hjá øðrum við í einum fjølbroyttum heimi. Men tað krevur, at vit eisni byggja okkara egna samfelag á fólkaræði, frælsi og javnrættindi hjá øllum persónum og bólkum. Tað er treytin fyri einum nútímans og skapandi samfelag.

Í løtuni er myndin hjá umheiminum av okkum tann øvuta. Vit eru øll koyrd í ein bás, vit ikki kenna okkum aftur í.

Tað mugu og skulu vit broyta. Og tað fer at eydnast. Um vit semjast øll við foldina. Hvørt við okkara náðir.

# Kommunubúskapurin er ikki trupulleikin

HEÐIN
MORTENSEN
Stýrisformaður, Kommunusamskipan Føroya



Sambært frágreiðing Búskaparráðsins fyri 2006 er íløguhugurin og útreiðslurnar hjá kommununum høvuðsvandamál í føroyska búskapinum í løtuni.

Kommunurnar kenna sær ikki hógv og yvirhita búskapin. Við spekulativum útrokningum um hvussu nógv, ið kommunurnar nú hava møguleika at skuldarbinda seg fyri uttan góðkenning frá landsstýrinum, mælir Búskaparráðið til, at kommunurnar í framtíðini skulu undir felags fíggjarkarm við landskassan til tess at fáa tamarhald á kommunubúskapinum.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Bárður Nielsen, tók í útvarpstíðindunum tráðin upp. Høvuðsboðskapurin var, at í kommununum er eingin fíggjarlig stýring, og – enn verri – landið hevur eingi amboð at stýra og tálma kommunalu útreiðslunum við.

Kommunusamskipan Føroya ógvast við hesar illgitingar um fíggjarligt ábyrgdarloysi úti í kommununum, og at tað eru kommunurnar, sum nú skulu hava ábyrgdina av yvirhitaðum føroyskum búskapi.

Fyri tað fyrsta er at siga, at øll fíggjarviðurskifti í kommununum eru skipað sambært lógum og reglum, sum landsstýrið hevur eftirlit við, og hetta er tað, ið kommunurnar hava at halda seg til.

Men tað er rætt, at samlaðu kommunalu útreiðslurnar eru hækkaðar síðstu árini. Hetta hongur tó neyvt saman við, at kommunalu uppgávurnar eisini eru vaksnar. Eitt nú er dagstovnaøkið og barnaverndarøkið lagt út til kommunurnar, og kommunurnar hava gjørt sær stóran ómak at skipa og menna hesi øki til at lúka lógarásettu tænastukrøvini bæði við starvsfólki og bygningum.

Kommunurnar hava síðstu árini goldið niður skuld og flestu teirra hava nú fingið eitt fíggjarligt rásarúm, sum tær við skynsemi kunnu brúka til íløgur. Men tað er ikki rætt, at kommunalu íløgurnar eru vaksnar munandi undanfarnu árini.

Tað er tó samstundis ein sannroynd, at landið áhaldandi áleggur kommununum nýggjar útreiðslur, harav fleiri krevja munandi íløgur innan stutt áramál. Harafturat koma allar tær útreiðslur, sum landið á hvørjum ári sleppur sær undan, og sum kommunurnar tí sjálvbodnar noyðast at taka á seg.

At tað sostatt ikki er samanhangur millum fíggjar- og búskaparpolitikkin og lóggávuarbeiðið hjá landsstýrinum annars á ymsu málsøkjunum, tað er ikki nakað, ið kann lastast kommununum fyri.

Kommunusamskipan Føroya metir, at tað er verandi ógreiða uppgávu- og ábyrgdarbýtið millum land og kommunur, sum á ongan hátt er fremjandi fyri útreiðslustýringina í kommununum. At fingið hetta greitt og skipað hevur nógv størri týdning fyri føroyska samfelagið heldur enn at binda kommunala sjálvræðið niður í ein fíggjarkarm hjá landsstýrinum, ið kommunurnar lítla ávirkan fáa á.

Tórshavn,
8. desember 2006

# Havi fult álit á Óla!

EYÐUN
JOHANNESEN
næstformaður í Føroya Fiskimannafelag

Hetta vildi eg sloppið undan Dan, men nú ert tú farin at draga meg inn í tína blaðskriving ímóti Óla Jacobsen í samband við felagsformansvalið í Fiskimannafelagnum. Hettar gert tú tíverri á ein slíkan hátt, at tað kann skiljast, sum at kílar ella ósemja eru millum Óla sum formann og meg sum næstformann í felagnum. Tí føli eg meg noyddan at svara. Nei Dan, soleiðis er slettis ikki, tvørtur ímóti.

Eisini vilt tú halda tað, at Óli brúkar felagið sum sína egnu kiosk.

Men Dan, hetta skilji eg sum, at vit allir í felagsstjórnini eru nakrar bíligar lættisoppanissur. Nei takk, min gode ven Dan!

**Fiskimenn kenna seg als ikki sleptar upp á fjall**

Í samband við málið um kryvjimaskinurnar, har tú dregur meg uppí, havi eg bert hesa viðmerking:

Soleiðis sum sáttmálin hjá FF er skipaður, er eingin ivi um, at ein og hvør roynd hjá reiðara at fáa manningina at víkja frá sáttmálanum er ógildug, uttan mun til, hvat ið er undirskrivað ella ikki. Tað er sjálvsagt uppgávan hjá formanninum at taka neyðug stig í so máta. Hetta stig varð m. a. tikið við tí brævi, sum varð sent reiðarafelagnum í hesum máli, og sum førdi til, at hesin trupulleiki varð greiddur.

Hetta varð gjørt í samráð við umboð fyri manning, sum var partur í hesum máli. FF hevur júst verið í samband við sama umboð fyri manningina, sum váttar, at hon ikki á nakran hátt følir seg svíktan av FF í hesi søk.

Annars er stórt sæð sama manning við enn, so her er eingin illstøða heldur komin burturúr.

**Skuldi heldur fegnast um framstigini…**

Tað avgerandi er, at kryvjimaskinur eru komnar umborð á skipini, og at arbeiðsumstøðurnar eru broyttar munandi til tað betra hjá fiskimonnum.

Her liggur parturin hjá FF ikki eftir, sum tað eisini er víst á í seinasta FF-blaði.

Hendan stóra lætta fegnast vit allir um. Eisini um, at hetta varð gjørt uttan at noyðast at gera á sama hátt sum við egningarmaskinuni, at manningin í fyrsta umfari kom at gjalda við niðurskurði av manningarpartinum. Eg loyvi mær at siga, at hetta er takkað veri formanninum og nevndini í samráðingartoganini við reiðarafelagið.

Og Dan skal ikki ákæra Óla fyri at umsita FF sum sína egnu kiosk, og harvið óbeinleiðis stjórnina fyri dugnaloysi, ella tað, sum eg kallaði lættisoppanissur. Tú skuldi heldur verið glaður fyri, at vit kláraðu at halda býtisprosentið heldur tað enn at prutla og putla við minni góðum gitingum.

Eg havi verið næstformaður í Føroya Fiskimannafelag í 20 ár. Tað skal eingin ivi vera um, at eg havi fult álit á Óla Jacobsen sum formanni, og at eg stuðli honum til formansvalið, sum stendur fyri framman.

Og, Dan, títt lesarabræv fekk meg at siga hetta alment.